## Rodrigo skaddur

Rodrigo skuldi ætlandi styrkja um framrættaða spælið hjá KÍ í hesum kappingarárinum. Klaksvíkingar hava eisini latið væl at brasilianska framherjanum. Undir venjingardysti fríggjakvøldið móti ÍF var Rodrigo so mikið óheppin at fáa tægraslit. Framvegis er ikki staðfest, hvussu álvarsamur skaðin er, men framherjin verður neyvan tøkur hjá Eyðuni Klakkstein, venjara hjá KÍ, komandi vikurnar. - Eg dugi als ikki at siga, hvussu leingi tað verður til hetta kemur í rættlag aftur, sigur Rodrigo við Norðlýsið.



## Morten í Gundadali

Føroysku venjararnir, sum seinastu vikuna hava arbeitt seg fram ímóti A venjaraloyvinum, høvdu leygardagin áhugaverda vitjan. Morten Olsen, venjari hjá danska landsliðnum, og Peter Rudbæk, venjari í fremstu røð í mong ár, vóru í Gundadali, har har teir saman við besta HB liðnum stóðu fyri venjingini. Morten Olsen vandi spælistíl, og Peter Rudbæk kunnaði um útbúgvingina fyri provenjarar. - Hóast systemini kundu tykjast eitt sindur innviklað í byrjanini, so gekk tað fínt. Hetta er venjingarhættir, ið kunnu brúkast í breiddarfótbólti, men eisini á úrmælingastøði. Eg brúki tað sjálvur í sambandi við venjingina hjá A-landsliðnum, segði Morten Olsen við FSF-heimasíðuna eftir venjingarnar.

# 9 ára gamal til talentvenjing hjá Brøndby

**Evnaríki klaksvíkingurin Jóhan Waag Høgnesen, sum í dag býr á Viðareiði, fór á middegi í fríggjadagin til tantvenjing hjá Brøndby**

FÓTBÓLTUR
*Birgir Waag Høgnesen*
*birgir@sosialurin.fo*

Jóhan, sum bert er 9 ára gamal, hevur, frá tí hann dugdi at ganga, víst, at fótbóltur er hansara eitt og alt. Jóhan hevur góð evni í blóðinum, tí pápin Manni Waag Høgnesen var í fleiri ár stinnur í KÍ-málinum. Eittnú á tí so kenda 66-liðnum. Stóribeiggi hjá Jóhan, Símun Waag Høgnesen, var við á liðnum hjá KÌ, sum vann meistarheitið 1999, so tað kann sigast, at hetta gongur í arv.

Skoytast kann uppí her, at abbin, Símun Waag Høgnesen, sum er kendur sum koyrilærari í Klaksvík, varð føroyameista við 1 deild hjá KÌ í 1945.

Feðgarnir báðir fóru fríggjadagin niður til Keypmannahavnar. Pápin hevur fyri einum mánaði síðan gjørt avtalu við Brøndby, at Jóhan kundi koma at talentvenja, nú ein venjingarlega fyri mini-putt dreingir var løgd um hetta mundið.

Pápin sigur, at tað eru fleiri sum vísa Jóhan ans, og tí hevur hann roynt at stuðla soninum og koyrt hann til venjingar í Klaksvík, eins og hann sjálvandi hevur fylgt við í dystunum, sum sonurin hevur spælt.

Pápin heldur, at tað er neyðugt, at dreingir í hesum aldrinum fáa nakrar avbjóðingar. Og hví ikki brúka tíð uppá hetta, heldur enn uppá ein ferð suðureftir, tí her fær Jóhan stóra gleði.

Sosialurin hitti Jóhan, tá feðgarnir vóru á veg á flogvøllurin. Jóhan sigur, at hann er sera spentur, tí einaferð í framtíðini ætlar hann sær at verða professionellur fótbóltspælari.

Jóhan sigur, at hann spælir við við smápiltunum hjá KÍ, og at teir í ár hava verið til fýra innandurakappingar, har KÍ- smádreingirnir hava vunnið tær tríggjar.

- Tað seinastu mundu vit vunnu. Tað bleiv avgjørt við straffi, og vit taptu. Men í øllum kappingunum kom einki mál inn hjá okkum, sigur hann við einum smíli.

Pápin og Jóhan koma aftur frá talentvenjingini um páskirnar.




*Tað var ein errin Jóhan Waag Høgnesen, sum fríggjadagin gjørdi seg til at fara við flogfarinum til Danmarkar*

# Fram skal spæla móti klaksvíkingum

**Fram vann trygt á Undrinum og skal spæla móti KÍ í øðrum umfari av steypakappingini. MB vann sær víðari luttøku í síðstu sekundunum av longdu leiktíðini móti NÍF**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Tað verður Fram úr 2. deild, sum skal spæla móti KÍ í øðrum umfari av kappingini um Løgmanssteypið. Hetta var greitt, eftir tryggan 3-0 sigur á niðari vølli í Gundadali í dag móti Undrinum. Helgi L. Petersen, sum í hesum kappingarárinum spælur við Fram, var tvær ferðir á blettinum, meðan Jørgen Meitilberg staðfesti sigurin. Øll málini komu í fyrra hálvleiki.

Tað stóð nógv á úti á Argjum. Neyðugt var við umdysti, áðrenn tað var greitt, hvør skuldi víðari í annað umfar. Hóast MB var meira á bóltinum, so smæddist NÍF ikki burtur. Esmar Fagraberg legði gestirnar úr Miðvági á odda, men áðrennn hvíldina javnaði Bjartur Dam fyri heimaliðið. Poul Poulsen skoraði til 2-1 í seinna hálvleiki, men ikki gekk long tíð til nólsoyingar aftur høvdu javnað. Málskjútti var Leiv Krossteig. Í seinastu minuttunum av vanligu leiktíðini fingu nólsoyingar ein mann útvístan.

Í síðstu sekundunum av longdu leiktíðini syrgdi Poul Poulsen, við máli til 3-2, fyri, at MB skal víðari í annað umfar. Har bíðar TB teimum.

**Dystirnir í 1. umfari:**

**Fram - Undri FF 3-0 (3-0)**
1-0: Helgi L. Petersen
2-0: Helgi L. Petersen
3-0: Jørgen Meitilberg

**NÍF - MB 2-3 (1-1)**
0-1: Esmar Fagraberg
1-1: Bjartur Dam
1-2: Poul Poulsen
2-2: Leiv Krossteig

2-2 eftir vanligu leiktíð
2-3: Poul Poulsen

## Frælsafelagið eitur Hvirlan

**Nýggja frælsafelagið í Havn eitur Ítróttarfelagið Hvirlan og hevur sum høvuðsendamál at virka fyri frælsum ítróttum**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Tíðindaskriv*

Stovnandi aðalfundur hjá nýggja felagnum varð hildin leygardagin.

Í nevndina vórðu vald Kára á Dunga, Rúna Hentze, Bjørg Svabo, Heri Ziska og Randi Kúrberg. Tiltakslimir eru Rógvi Højgaard og Jan Hentze.

Í fyrstuni verða barna- og kastivenjing á skránni, men roynt verður at ganga øllum áhuga á møti eins og miðað verður móti at íðka allar frælsu ítróttirnar. Tað vil siga tey fýra kastini, tey fýra lopini, forðarenningarnar og stutt- mið og langteina renning. Fremsta avbjóðingin hjá felagnum til tess at halda síni stevnumið verður at fáa og útbúgva venjarar.

Heimasíðan varð eisini avdúkað á tíðindafundinum, og verður hon við sínum kunnandi tilfari um felagið í lagi í komandi viku, og kemur hon eftir ætlan at eita hvirlan.fo.

Litir felagsins eru reytt, svart og hvítt, og búmerkið, ið Árni Ziska hevur teknað, er hvirluskapa skjøldur við forðarennara, ið er á veg um eina forðing.

*Soleiðis sær búmerkið hjá nýggja frælsisfelagnum út. Stovnandi aðalfundur varð hildin leygardagin*